Frá: Turið Mørkøre, Noreg, turid.morkore@akvaforsk.nlh.no
Dagur 13.03.01
Til: birgir@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

TELDUBRÆVIÐ

# Harry, Ola-buksur og kaffi-Lars

Norðmenn brúka í stóran mun fólkanøvn til at lýsa lutir og persónligar eginleikar. Í dag er tað til dømis ikki serliga smart at eita Harry ella Hjørdis.

Tað eru sera fá dreingjabørn, sum verða doypt Harry í dag. Orsøkin er, at Harry er vorðið er fyribrigdi sum verður nýtt um lutir, gerðir og fólk á ein heldur negativan hátt. Til dømis er tað Harry at hava blinkandi ljósperur í vindeygunum um jólini, at hava Wunderbaum hangandi á speglinum í bilinum, at ganga í sólbrillum tá tað er myrkt og at tosa hart í mobil-telefon, har onnur fólk eru tilstaðar. Tað er eisini stak Harry at hjún ganga túr við puddilhundi í identiskum sprøklutum treningsklæðum og nýbustaðum joggingskóm.

Hvat er so at vera Hjørdis? Jú, Hjørdis verður brúkt um eina ávísa typu av konufólki og um lutir sum verða brúktir av konufólki. Ein Hjørdis kann til dømis verða ein solariibrún dama um tey fimti, sum klæðir seg í so ungdommiliga, t.d. strammar gamasjubuksur og niðurringaðan topp, har ongin della verður fjøld. Tað er eisini Hjørdis at ganga í høghælaðum spískum skóm og útvaskaðum frotésokkum, sum mangla elastikk, samstundis. Hjørdis-lutir kunnu vera stórar gullmálaðar bamsur at hanga í oyruni, breið svørt plastikkbelti við píkum á og lillafarva hárspenni við nylon-duskum. Ein Hjørdis smæðist ikki burtur í einum selskapi, og henni dámar væl ein lítlan ella báðar tveir. Hon brýggjar seg ikki so nógv um samfelagsligar spurningar, og tápulig úttalilsi frá konufólki verða ofta karakteriserað sum heilt Hjørdis.

Frá gomlum av vóru Ola og Kari tey mest brúktu fólkanøvnini í Noregi. Í dag er tað meira populert at kalla børnini t.d. Sondre ella Marie, men tá norðmenn sipa til fólk flest, ja so tosa teir um Ola og Kari Normann. Sermerkið fyri Ola og Kari er til dømis at teimum dámar væl at standa á skíð, tey rópa »Hurra for Norge« á tjóðardegnum søttende mai, tey standa í heilsukø og tey hava ilt við at góðtaka tann príspolitikkin, sum verður førdur í Noregi.

Navnið Ola verður eisini brúkt um klæðir og lutir sum verða nýttir av teimum flestu. Norðmenn hava ikki hoyrt um cowboy-buksur. Í Noregi eita cowboy-buksur Ola-buksur, cowboy-jakki verður róptur Ola-jakki, og ein Ola-bilur er ein heimasmíðaður kassabilur av tunnufjalum og barnavognshjólum sum flestu smádreingir spæla við.

Tá kaffi-Lars verður nevndur fáa flestu norðmenn eitt saligt smíl um varrarnar. Kaffi-Lars er ein gamaldags jarnketil at kóka kaffi í úti í náttúruni. Hesin verður ofta nýttir um veturin uppi á fjallinum av norðmonnum, sum rinda sær møðina aftaná ein langan túr á skíð. Tá pápin fer at kinda bál og mamman finnur fram kaffi og kaffi-Lars frá ryggsekkinum, ja tá er tað »koselig på fjellet«.

# Harry Potter



SJÓNARMIÐ
*Elinborg Joensen*

Hava børn hug at lesa, so lesa tey helst Harry Potter. Lesa tey ikki Harry Potter, so hava tey í øllum førum hoyrt um hann. Jú, eingin ivi er um, at hesin navnframi Potter er væl umtóktur hjá teimum flestu. Tað eru seld ikki færri enn 400.000 eintøk bara í Danmark. Bøkurnar eru útgivnar í meir enn 100 londum, og hava selt 76 mió. eintøk. Og í heyst var hin fyrsta bókin um Harry í pottinum á føroyskum. Í týðing hjá Gunnari Hoydal, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út undir heitinum »Harry Potter og Vitramannasteinurin«. So aftur her megna vit at vera við í tí, sum fer fram úti í stóra heimi.

Men annað enn bara bøkur eru á veg. Tað stóra amerikanska filmsfelagið Warner Brothers hevur keypt rættindini til filmin um Harry Potter og vitramannasteinin, sum kemur í kykmyndahallirnar kring knøttin í ár. LEGO hevur keypt rættindini til figurarnar, sum kanska eisini koma í sambandi við filmin.

Felagið Electronic Arts arbeiðir við einum telduspæli, sum byggir á Harry Potter bøkurnar. Og skjótt koma eisini Harry Potter-savnikort á marknaðin. Og soleiðis kundi ein hildið fram.

## Spennandi og stuttligt

Harry Potter gongur á kostskúlanum Hogwarts. Allar lærugreinarnar hava okkurt við okkult kynstur at gera. Hann lærir til gandakall. Ein góðan gandakall, sjálvandi. Á Hogwarts trívist tað góða og tað ónda, bæði millum lærarar og næmingar. Sum gandakallar og gandakallanæmingar fáa tey gandamegina at ráða yvir. So er tað upp til tey sjálvi at avgera, hvat hon skal nýtast til. Bøkurnar greiða frá einum dysti, sum eins og í øllum góðum søgum, er ein dystur millum tað góða og tað ónda. Men rithøvundurin er í parti við tí góða.

Rithøvundurin Joanne Kathleen Rowling hevur eitt ótrúligt hugflog, og skrivar á ein stuttligan hátt. Nógvir av persónunum eru heldur ógvusliga lýstir, men hóast tað stuttligir. Hetta gevur eisini møguleika fyri at liva seg inn í persónarnar. Tú hevur eina hóming av, at tú kennir teir.

## Bert ein hugaheimur?

Tá tú lesur, er eingin ivi um, at hetta er ein hugaheimur. Kortini er bókin so livandi skrivað, at tað eru dømir um, at børn, mentalt eru flutt inn í Hogwarts-heimin, og nærum hava mist sambandið við vanligu umstøðurnar. Og helst verður tað enn meira at hoyra um hetta, tá tað skjótt kemur bæði ein filmur og telduspæl um víðagitna gandakallin.

## Ikki bert barnabøkur

Tað eru fýra bøkur í røðini um Harry Potter. Ætlanin er at geva í alt sjey bøkur út, og av hesum er bert tann eina higartil komin út á føroyskum. Tann næsta kemur væntandi út í summar, og tann triðja longu í heyst. Bøkurnar eru skrivaðar til børn, men ikki eru tað bara børn, ið lesa tær. Umframt børnini, kunnu bæði annað og triðja ættarlið lesa tær.

Nguyen Thi Thu, sum hevur ein lítlan bókhandil í Hanoi, sigur um Harry Potter-bøkurnar: »…Um eg ikki havi bøkurnar her útgávudagin, verða fólk heldur gruggut. Tey eru bundin av hesum bókunum…og eg tosi ikki um børn.«

## Harry Potter og Pokémon

Hetta líkist ikki sørt Pokémon. Hann er helst ikki farin í gloymibókina enn. Vit minnast, at fólk vóru ójøvn á máli um Pokémonarnar. Summi søgdu, at teir vóru púra ósekir figurar, meðan onnur søgdu at tað var grundað á ein japanskan átrúnað, ið nevnist Shinto Buddisma. Fólk máttu hava hesi kortini at býta sínámillum, og gjørdust uppøst, um tey ikki fingu tey.

Um hetta endurtekur seg við Harry Potter, er ilt at siga. Men eini góð ráð eru at kanna, hvat tað er, ið børnini lesa og hvussu tey uppliva tað, tey lesa. Soleiðis kann ein kanska fyribyrgja, at tað tey lesa hevur ringa ávirkan á tey.




ítróttur
Nr. 54 • leygardagur • 17. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyameistarar á Giljanesi

**Higartil eru tað bert Mjølnir og Fleyr, sum hava vunnið bestu kvinnudeildina, men hetta verður helst broytt leygardagin**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Leygardagin kunnu vágagentur tryggja sær føroyameistaraheitið í flogbólti, tá tær kl. 13,30 fara á vøllin ímóti Fossánesi. Dysturin verður leiktur á Giljanesi.

Treytin er, at tær einki sett tapa, tí settmunurin til næsta liðið er eingin og stigini eru tey somu. Men Dráttur hevur ikki havt trupulleikar higartil ímóti Fossánesi, sum higartil í kappingini bert hevur vunnið ein dyst.

Um tað eydnast Drátti at vinna FM-heitið, verður hetta søguligt á tann hátt, at hetta er fyrsta liðið, sum vinnur FM í meistaradeildini umframt Mjølnir og Fleyr.

Lið í Vágunum hava fyrr vunnið FM, men tá hevur tað verið í navninum SÍF og MB, og tá var navnið á bestu deildini 1.deild.

SÍF var seinast vinnari í 1979 og 1980, meðan MB vann kappingina árini 1976, 1977 og 1978.

### Aðrir dystir

Í Havn leika Fleyr og Mjølnir kl. 13,00 leygardagin í Gundadalshøllini. Hesin dysturin hevur ikki tann stóra týdningin í endaligu støðuni hjá liðunum, uttan tað, at Mjølnir helst ikki skal tapa nakað sett, um tað skuldi hent, at Dráttur snávaði á Giljanesi.

### Bronsustríð á Tvøroyri

Hvør vinnur bronsuna verður avgjørt á Tvøroyri sunnudagin kl. 13,00 millum TB og ÍF. Vinnarin av dystinum gerst nr. 3 í endaligu støðuni.

# Bert silvurstríðið eftir

**Gullspurningurin varð svaraður fyri viku síðani, men annars er einki avgjørt í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR, MENN

Hjá monnunum hevur ÍF longur tryggja sær FM-heitið áðrenn seinasta umfar, men enn er ikki heilt avgjørt, um tað verður Fram, Mjølnir ella Fleyr sum vinnur silvurið.

Báðir dystirnir hjá monnunum vera í Havn leygardagin kl. 15,00. Á Eysturskúlanum leika Fram og ÍF og í Gundadalshøllini leika Fleyr og Mjølnir.

Sum tað framgongur eru bert 2 stig á muni millum nr. 2 og nr. 4. Avgjørt er tó, at tað eru bert Mjølnir og Fram, sum kunnu tryggja sær silvurmerkini. Skal Mjølnir vinna silvurmerkin, so skal Fram tapa ímóti ÍF og Mjølnir vinna ímóti Fleyr.

Vinnur Fleyr haraftur-ímóti á Mjølni, so fær Fleyr bronsumerkini og Mjølnir einki, meðan Fram fær silvurin, líkamikið um teir vinna ella tapa ímóti ÍF.

So hetta kunnu gerast tveir spennandi dystir.



*Meðan tað hjá kvinnunum framvegis er spenningur um gullið, tykist spenningurin hjá monnunum at snúgva seg um silvurmerkini*

## Støðan í fremstu deildunum undan seinastu dystunum

### Støðan, Meistaradeild Kvinnur

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Dráttur | 19 | 17 | 2 | 55 | 13 | 42 | 25 |
| Mjølnir | 19 | 17 | 2 | 54 | 12 | 42 | 25 |
| ÍF | 19 | 8 | 11 | 27 | 39 | -12 | 13 |
| TB | 19 | 8 | 11 | 36 | 34 | 2 | 12 |
| Fleyr | 19 | 6 | 13 | 21 | 45 | -24 | 7 |
| Fossánes | 19 | 1 | 18 | 5 | 55 | -50 | 2 |

### Støðan, Meistaradeild Menn

| Støðan | | Dystir | | | Sett | | * |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 15 | 11 | 4 | 37 | 21 | 16 | 17 |
| Fram | 15 | 9 | 6 | 35 | 25 | 10 | 14 |
| Mjølnir | 15 | 10 | 5 | 37 | 21 | 16 | 13 |
| Fleyr | 15 | 8 | 7 | 28 | 25 | 3 | 12 |
| SÍ | 16 | 0 | 16 | 3 | 48 | *45 | 0 |

# Mugu hava gaggur við



*Hóast fótbóltsdystin, so skuldi borið til hjá áskoðarunum at verið væl upphitaðir, so sum teir eisini vóru í Sveis seinasta heyst*

**Tá 12. maður fer til Luksmburg í komandi viku, verður tað ikki bert fyri at hyggja at fótbólti, teir skulu eisini spæla**

ÁSKOÐARAR
*Jákup Mørk*

Tað kann ikki sigast annað enn, at A-landslið okkara í fótbólti hevur havt góðan stuðul, tá teir hava ferðast kring Europa, har ymsu landsdystirnir eru á skránni.

12. maður hevur verið við at kalla hvørja ferð, men hetta hevur altíð verið sum moralskur stuðul frá áskoðaraplássunum.

### Landsdyst

Hesa ferð verður tó øðrvísi. Formaðurin í 12. manni, Regin Egholm, greiðir frá, at teir á ferðini til Luksemburg eisini skulu spæla landsdyst. Talan er sjálvandi um dyst móti áskoðarunum hjá Luksemburg, og eisini hesin verður spældur leygardagin.

Regin greiðir frá, at teir hava veri ðí sambandi við onkran av teimum, sum plaga at skipa fyri upphitingini hjá áskoðarunum, tá Luksemburg spælir sínar dystir, og avtalað er so teirra millum, at hesa ferð skulu áskoðararnir eisini sleppa at royna seg.

Áskoðarabólkurin hjá mótstøðuliðnum hevur verið í samband við lokala fótbóltssambandið, og hesir hava játtað at hjálpt til við fyrireikingunum. Sostatt er vøllur fingin til vega, eins og fótbóltssambandið eisini syrgir fyri, at dómari er settur at døma dystin. Alt fyri at tiltakið skal hava so hátíðarkendan dám sum gjørligt.

Tískil hava tey, sum hesa ferð fara við landsliðnum, fingið eitt bræv, sum er álíkt teimum, sum Allan Simonsen plagar at senda sínum monnum. Har stendur millum annað, at leikararnir skulu hava gyldugt ferðapass og skógvar til at spæla á grasi.

Regin Egholm sigur annars, at hann sjálvandi gleðir seg til ferðina, og ikki minst til fótbóltsdystin. Han sigur, at teir fyrr hava roynt seg í millum øðrum bowling dystum móti mótstøðulondum, men at hetta er fyrsta ferð, at talan verður um fótbóltsdyst.

Dysturin millum áskoðararnar hjá Luksemburg og Føroyum verður leiktur leygardagin kl. 13.00, so hóast hetta, so skuldi ikki verið nakar trupulleiki at komið til A-landsdystin millum londini bæði. Hesin verður spældur kl. 18.00.